| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 26. januar 2012 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2012 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2012 tann 26. januar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. januar 2012 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2012.**

***Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2011.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, dagfest 16. januar 2012 saman við grannskoðaðum roknskapi og grannskoðarafrágreiðing fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2011.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 738.238,39** móti mettum kr. 710.000,00. Sostatt eru kr. 28.238,39 meira nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 60.038,00 hægri enn mett, hetta kemst einamest av, at býráðið tann 01. mai 2011 hevur sett bókavørð við útbúgving í starv, og at lønin hjá hesum er væl hægri flokkað enn fyribilsstarv hjá bókavørði uttan útbúgving.

Húsaútreiðslurnar hava verið kr. 41.573,62 lægri enn mett, við tað at bert kr. 19.032,02 eru nýttar til umvælingar móti mettum kr. 65.000,00,meðan bókakeyp og innbinding hava verið kr. 13.554,49 lægri enn mett. Aðrar útreiðslur hava verið kr. 23.329,02 hægri enn mett. Hækkingin stavar frá meirútreiðslum í sambandi við telefon og leigu av maskinum.

Inntøkurnar hava verið kr. 192.035,00 í landskassastuðli móti mettum kr. 284.000,00, t.v.s. kr. 91.965,00 minni enn mett, og hevur kommunan sostatt borðið restina av kostnaðinum, t.e. 543.876,56.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstraræltan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstraræltanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2010 er grundaður á rakstraræltanina fyri 2011. Sambært rakstraræltanina fyri 2011 varð roknað við einum kostnaði upp á kr. 710.000,00 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi landskassastuðulin verið kr. 284.000,00, men sambært skrivi frá Føroya Landsbókasavni dagf. 16. juli 2008, verða bert kr. 460.000,00 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum so gevur kommununi kr. 192.000,00.

Roknskapurin 2011 vísir, at kr. 91.965,00 resta í Landskassastuðli, um talan varð um 40%, so býtið 60>40% er ikki í lagi. Sambært roknskapinum er hetta 74>26%.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 17. januar 2012, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2011 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2011 uttan viðmerkingar. (9-0).

**Mál nr. 02/2012.**

**Mál viðvíkjandi viðlíkahaldsvetan av "Koksinum" í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 01. desember 2012 tikið avgerð um, at ein meting skal verða gjørd av, hvørjum standi Koksið er í. Somuleiðis varð á fundinum samtykt at taka Tip-top bygningin

og neystið hjá Hans Jacob Brúnni niður, eins og víðari verður arbeitt við at nýta Borgbygningin til savn, soleiðis at hesin kann verða tillagaður umhvørvinum.

Í hesum sambandi hevur kommunan heitt á Teknistovuna v/Eyðuni Petersen, ark., Torvgøta 1, 600 Saltangará um at gera eina viðlíkahaldsnetan av bygninginum Koksinum, og fyriliggur henda, dagfest januar 2012.

Henda lýsir ein inngang, frágreiðing um bygningin og støði á sjálvum bygninginum. Niðurstøðan, sum gjørd er út frá, hvørjum standi bygningurin er í er henda: "Mælt verður til, at bygningurin sum skjótast verður tikin niður og burturbeindur.

Í øðrum føri verður mælt til, at bygningurin verður gjørdur tryggur, soleiðis at skaði ikki stenst av leysum húsalutum (klædningsplátum og takplátum ol.), eins og at skipað verður fyri, at óviðkomandi ikki kunnu fara inn í bygningin, við tað at tað kann verða sera vandamekið at ferðast í bygninginum, tá ið gólvplátur fleiri staðir neyvan halda til fólk at ganga á teimum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá Teknistovuni um at taka "Koksið" niður. 8 atkvøður fyri og 1 atkvøða ímóti. Ímóti atkvøddi Magnus S. Midjord.

**Mál nr. 03/2012.**

**Viðvíkjandi ískoyti til leigusáttmálar hjá P/F Havsbrún.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Bank Nordik, dagfest 05. januar 2011 viðvíkjandi áheitan um ískoyti til niðanfyri standandi leigusáttmálar millum P/F Havsbrún sum leigara og Fuglafjarðar kommunu sum eigara.

1. Matr. nr. 240, sum er lendið undir mjølvirkium, við leigusáttmála frá 07. mars 1966 við seinni ískoytum.
2. Matr. nr. 239z, sum er lendi undir ketilhúsið, við uppruna leigusáttmála frá 23. februar 1999 við seinni ískoytum.
3. Matr. nr. 239ac, sum er lendi undir goymslubygningyurin hjá fóðurdeildini, við uppruna leigusáttmála, dagfestur 08. mai 2006 við seinni ískoytum.
4. Matr. nr. 239f, sum er lendið undir Pelagos, við leigusáttmála, dagfestur 18. juni 2002 við seinni ískoytum.
5. Matr. nr. 239d, sum er lendi undir mjølgoymslu, dagfestur 06. februar 1999 við seinni ískoytum.
6. Matr. nr. 239t, sum er lendi undir blandi- og silohøll, dagfestur 08. mai 2001 við seinni ískoytum.
7. Matr. nr. 239s, sum er lendi undir olju- og lýsitangunum, við leigusáttmála, dagfestur 30. september 1986 við seinni ískoytum.
8. Matr. nr. 239r, sum er lendi udir fóðurvirkinum, dagfestur 10. mars 1987 við seinni ískoytum.

Fyrisitingin hevur tann 06. januar 2012 sent málið til løgfrøðisligar kanningar hjá løgfrøðinginum á Kommunusamskipan Føroya saman til tilfarinum, sum viðvíkir leigusáttmálanum fyri matr. nr. 240 við seinni broytingum, og tí ískoyti, sum kommunan gjøgnum Bank Nordik hevur fingið undirskrivað av Regin Jacobsen, stjóra í P/F Bakkafrost vegna Havsbrún.

Við teldupsoti, dagfestum 11. januar 2011 boðar løgfrøðingurin frá, at hann hevur kannað málið, og at hann ikki metir so nógv bein verða í málinum kortini, hóast mínar viðmerkingar.

Hann vísir til, at rætturin til at traðka inn í sáttmálan, sum ískoytið heimilar, longu er heimilað í § 7 í uppruna sáttmálanum um mjølvirkið frá 21. mars 1966. Sama er galdandi fyri allar hinar 7 leigusáttmálarnar millum kommununa og P/F Havsbrún.

So er spurningurin, um kommunan skal undirskrivað ískoytini ella kanska bert senda bankanum avrit av § 7 í sáttmálanum til kunningar og spyrja, um bankin ikki heldur, at verandi § 7 er nøktandi. Løgfrøðingurin mælir til seinna.

Fyrisitingin hevur verið í samband við vinnudeildina hjá Bank Nordik ídag, og er løgfrøðisliga niðurstøðan fyriløgd teimum í málinum. Bankin heldur tó fast við, at áheitan teirra um ískoytini til sáttmálarnar stendur við, hóast § 7 hevur víðar heimildir. Henda er grundað á, at bankin við ískoytunum vil hava eina eyka trygd yvir fyri Tinglýsingini í samband við fíggjarligar avtalur millum Havsbrún og bankan.

Býráðið hevur á fundi tann 06. november 2008 viðgjørt og góðkent ískoyti til FIH kapitalbank í sambandi við 8 leigusáttmálar millum P/F Havsbrún og kommununa, og vorðu hesi undirskrivað av

kommununi tann 06. november 2011, somuleiðis sum avgerðin varð kunngjørd Havsbrún við skrivi, dagfestum 10. november h.á.

Hesi ískoyti vórðu annars flutt frá FIH Erhvervsbank, sum hevði fingið ískoytini í 2006, yvir til FIH Kapitalbank.

Tá varð málið latið Advokatskrivstovuni til løgfrøðisligar kanningar, eins og fundur varð hildin partanna millum tann 31. oktober 2008, har tilmælt varð, at kommunan skuldi góðkenna ískoytini uttan viðmerkingar.

Hetta er júst sama kanning og niðurstøður, sum løgfrøðingurin er komin við sambært telduposti, dagfestum 11. januar 2012.

Við tað at allir leigusáttmálar, sum kommunan hevur við Havsbrún eru góðkendir av kommunustýrinum eins og øll ískoytini, ið framd eru til galdandi sáttmálar, so verður fyrisitingarliga mælt býráðsnum til at góðkenna fyriliggjandi ískoyti til omanfyri nevndu 8 leigusáttmálar uttan viðmerkingar.

Upplýsast skal, at nevndu galdandi leigumál millum kommununa og P/F Havsbrún eru í gildi fram til:

1. Matr. nr. 240 til 01. januar 2019.
2. Matr. nr. 239z til 01. oktober 2029.
3. Matr. nr. 239ac til 31. mai 2031.
4. Matr. nr. 239f til 31. mars 2014.
5. Matr. nr. 239d til 01. januar 2019.
6. Matr. nr. 239t til 31. mai 2030.
7. Matr. nr. 239s til 01. apríl 2017.
8. Matr. nr. 239r til 01. mars 2017.

Leigusáttmálin millum kommununa og Havsbrún fyri matr. nr. 239b (Ice), dagfestur 08. mars 1973 er farin úr gildi tann 08. mars 1998, men hevur kommunan tó ikki sagt leigumálið upp enn.

Við tað at einki virksemi hevur verið í bygninginum í mong ár, so verður mælt býráðnum til at viðgerða henda spurning og møguliga siga leigusáttmálan upp sambært treytunum og at krevja tað bygda á økinum, sum er í sera vánaligum standi burturtikið, við tað at mett verður, at einki virksemi verður aftur í bygninginum á leigaða lendinum.

Haraftrat gongur leigumálið, sum kommunan hevur við P/F Havsbrún fyri matr. nr. 239y (smiðjan hjá Fuglafjarðar mekaniska verkstaðl/KJ-Hydraulik), dagfest 11. juni 2009 út tann 30. juni 2012.

Lendið er sambært ískoyti, dagfest 04. apríl 2011 framleigað til Høgna Kjeld til 31. desember 2011, so framleiganin, tessvegna er farin úr gildi, við tað at nýggj átekning við góðkenning ikki er umbiðin av leigara og ella framleigara.

**Avgerð:**
Samtykt varð at góðkenna ískoytini til teir 8 leigusáttmálarnar millum kommununa og P/F Havsbrún, hetta vísandi til § 7. (9-0).

Jann Toftegaard setti uppskot fram á fundinum um at siga leigumálið, sum annars er útgingið tann 08. mars 1998 millum kommununa og Havsbrún viðvíkjandi matr. Nr. 239b (Ice) upp, og at felagið tekur Ice-bygningin niður, og at eitt nýtt leigumál verður gjørt partanna millum fyri lendið undir manningarhúsinum, sum annars stendur á sama matrikuli. Uppskotið fall. 1 atkøða fyri, 3 atkvøður ímóti og 5 vóru blankan. Ímóti atkvøddu: Dánjal Vang, Magnus S. Midjord og Petur Abrahamsen. Blankt atkvøddu: Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Kristina Toftegaard Larsen, Elisabeth D. Eidevig og Sonni á Horni.

Borgarstjórin setti eisini fram uppskot á fundinum um at fara í dialog við Havsbrún viðvíkjandi leigumálinum fyri matr. Nr. 239b um at siga sáttmálan upp, taka Ice-bygningin niður og at gera nýtt leigumál fyri manningarhúsi partanna millum, sum ídag eisini stendur á matr. nr. 239b. Uppskotið varð samtykt. (8 atkv. Fyri og 1 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddi Jann Toftegaard).

**<u>Mál nr. 04/2012.</u>**

**Umsókn frá P/F Havsbrún um øki í sambandi við útbygging av fóðurgoymsluni.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Havsbrún, dagfest 11. oktober 2010 um byggiloyvi til "fóðurgoymslu III" á økinum framman fyri tunnilsmunnan 60 metrar suður frá verandi fóðurgoymslu og 22,50 metrar heim frá bygninginum hjá P/F Bergfrost.

Havnanevndin boðar í skrivi, dagfestum 20. januar 2011 P/F Havsbrún frá, at umsóknin at byggja á økinum sunnan fyri verandi fóðurgoymslu ikki kann verða gingin á møti, men at kommunan saman við felagnum arbeiðir víðari við at finna aðrar loysnir.

Kommunan og Havsbrún hava síðan arbeitt víðari við hesum máli, og vísandi til fundarfrásøgn millum fyrisitingina og leiðsluna í Havsbrún tann 13. desember 2011, varð niðurstøðan tann, at Havsbrún tekur undir við, at bygt verður sambært "uppskoti 2", har fóðurgoymsla III verður bygd á øki, sum verður planerað uttan fyri verandi fóðurgoymslu.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 23. januar 2012, og mælir nevndin býráðnum til, at prinsipielt verður tikið undir við, at bygt verður sambært uppskoti 2 uttan at taka støðu til spurningin um fígging.

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. ( 7 atkv. Fyri, 1 atkvøða ímóti og 1 atkøða varð blonk. Ímóti atkvøddi Jann Toftegaard, meðan Sonni á Horni atkvøddi blankt).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.35.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eidevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen